# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Fíggjarkreppan í USA kemst av búskaparligum hugsjónum, sum John McCain tekur undir við*
*(Barrack Obama)*

# Trý pinkubørn deyð av eitraðari mjólk

**Meiri enn 1.200 onnur hava fingið nýrasjúku av at drekka ta eitraðu mjólkina**



*Cheng Aobing, sum er átta mánaðir, hevur fingið nýrastein eftir at hava brúkt ta eitraðu mjólkina (Mynd: Polfoto)*

Kinesisku myndugleikarnir kunngjørdu í morgun, at eitt pinkubarn afturat var deytt eftir at hava fingið mjólk, sum var blandað úr eitraðum mjólkarpulvuri. Sostatt eru trý børn deyð tað seinasta samdøgrið.

Heilsumyndugleikarnir í Kina siga, at minst 6.244 pinkubørn eru vorðin sjúk eftir at hava fingið ta eitraðu mjólkina. Av tteimum eru trý deyð, og støðan hjá 158 øðrum er álvarssom. Av teimum sjúku hava meiri enn 1.200 fingið nýrasjúku.

Tað eitraða mjólkarpulvurið er gjørt á einari kinesiskari verksmiðju, sum danska fyriotøkan Arla eigur. Framleiðslan er steðgað, eftir at tað er komið fram, at kinesiska verksmiðjan hevur latið evnið melamin í mjólkarpulvurið.

Aðalstjórin í Arla, Peder Tuborgh, sum av tilvild var staddur í Kina, tá málið kom fram, segði á tíðindafundi í nátt, at talan er um einki minni enn eina landsumfatandi vanlukku. Sambært blaðnum China Daily komu teir fyrstu trupulleikarnir av teirri eitraðu mjólkini undan kavi longu í juni.

## Palin vil ikki samstarva

**Sarah Palin, guvernørur og varaforsetavalevni, vil ikki hjálpa ákæruvaldinum í Alaska, sum kannar, um hon og hennara hava kunnu skuldsetast fyri valdsmisnýtslu**



*Sarah Palin vil ikki medvirka í einari kanning um møguliga valdsmisnýtslu (Mynd: Polfoto)*

**Sarah Palin var ikki vorðin varaforsetavalevni, tá tað løggevandi tingið í Alaska samtykti at kanna tíðindi um, at hon skal hava misnýtt sítt vald sum guvernørur í statinum. Samtyktin í tinginum var einmælt.**

**Kanningin varð sett í verk fyri tveimum mánaðum síðani, og tá segði Sarah Palin, at hon var fegin um, at málið bleiv kannað, og at hon fór at arbeiða saman við ákæruvaldinum. Men ein talsmaður hjá John McCain segði við blaðið The Washington Post í gjár, at tað er ikki sannlíkt, at Sarah Palin fer at samstarva við ákæran, sum tekur sær av kanningini.**

**Kanningin skal avdúka, um Sarah Palin ella onkur av hennara næstu medarbeiðarum misbrúktu sínar heimildir við tí úrsliti, at leiðarin fyri almennu trygdini í Alaska, Walt Monegan, misti sítt starv. Sambært Sarah Palin fekk hann sekkin orsakað av ósemju um fíggjarætlanina, men onnur vilja vera við, at Monegan fekk sekkin, tí hann sýtti fyri at siga einum løgreglumanni úr starvi. Hesin løgreglumaðurin hevði verið giftur við einari systir Sarah Palin, og teirra hjúnaskilnaður hevði verið ein av teimum ógvusligu, skrivar AP.**

## Ísraelskt álop var kanska krígsbrotsverk

**Eitt ísraelskt álop í novembur í 2006, sum kostaði 18 sivilum palestinum lívið, var kanska eitt krígsbrotsverk, sigur Desmond Tutu.**

Suðurafrikanski erkabiskupurin, sum fekk Nobelfriðarheiðurslønina í 1985, virkar nú sum serligur ST-sendimaður í mannarættindamálum. Fyrr í ár vitjaði hann Gazageiran, og í einari frágreiðing, sum hann nú hevur latið mannarættindanevndini hjá ST, skrivar hann, at kanska hevði tað verið rætt at staðfest eitt ísraelskt álop á Beit Hanoun tann 8. novembur í 2006 sum krígsbrotsverk. Í frágreiðingini skrivar Desmond Tutu, at ísraelska herleiðslan hevur ikki givið nakra væl undirbygda frágreiðing um álopið.

Orðini hjá Tutu hava vakt ans í Ísrael. Talsmaðurin hjá herleiðsluni, Yigal Palmor, sigur við Reuters, at tað er harmiligt, at ein so kendur persónur sum Desmond Tutu skal koma við tílíkum skuldsetingum uttan at kanna veruleikan.

Ísraelska herleiðslan hevur fyrr sagt, at ísraelski herurin hevði rætt til at søkja at Beit Hanoun, tí palestinar høvdu skotið rakettir haðani. Herleiðslan ásannaði, at sivilir palestinar høvdu latið lív í álopinum, men segði, at tað komst av breki við einari rakett, sum fór av kós.

Desmond Tutu heldur ikki, mat ísraelska frágreiðingin er haldgóð og vil hava eina óhefta og opnakanning av álopinum á Beit Hanoun.



*Desmond Tutu arbeiðir nú fyri ST (Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Petraeus ur Irak til Florida

Generalurin Raymond Odierno hevur nú tikið við sum ovasti fyri teimum 146.000 amerikonsku hermonnunum í Irak eftir generalin David Petraeus, sum hevur staðið á odda fyri hermonnunum í umleið hálvtannað ár.

Sjálvt skiftið hendi á einum hátíðarhaldi í Bagdad, og var amerikanski verjumálaráðharrin, Robert Gates, hjástaddur.

David Petraeus hevur fingið rós fyri at hava megnað at steðga blóðuga ófriðinum, sum var í Irak, tá hann tók við sum ovasti, og sum er minkaður nógv síðani.

Nú hann er givin í Irak, skal David Petraeus hava yvirumsjón við teimum amerikonsku herdeildunum í Miðeystri og Afghanistan. Tað starvið fer hann í í næsta mánaði, og tá hann skal hann hava skrivstovu í býnum Tampa í statinum Florida, skrivar AP.

### Horvin list komin aftur

Í Niðurlondum hevur løgreglan funnið fimm listarverk frá seytjandu øld, sum hava verið horvin í fleiri ár. Teir fimm málningarnir vórðu stolnir úr savninum Frans Hal fyri seks árum síðani, men eru nú komin afturíaftur og vórðu fyri fyrstu ferð sýnd fram av nýggjum í gjár.

Løgreglan sigur við blaðið De Telegraaf, at málningarnir vórðu funnir aftur seinasta vikuskiftið, og at trý fólk eru handtikin og skuldsett fyri at hava tikið málningarnar í 2002.

Málningarnir, sum eru eftir Steen, Cornelis Bega, Adriaan van Ostade og Cornelis Dusart, vóru tryggjaðir fyri tríggjar milliónir evrur, tá teir vórðu stolnir, men sambært De Telegraaf eru teir væl meiri verdir enn so.